# Tú hevur fingið seymað sár



Tú hevur fingið seymað eitt sár. Tí er tað umráðandi, at tú heldur eyga við um bruni kemur í.

## Bruni

Tekin um bruna er:

- at roði, verkur og hiti er í sárinum
- sárið hovnar.
- dukandi pína
- fepur
- reyð rípa undir húðini har sárið er

Eru tekin til bruna, er neyðugt at seta seg í samband við lækna. Umvavið ella plástrið eigur ikki at blíva vátt. Blóð skal ikki seyra ígjøgnum. Hendir tað kortini, so skal umvavið ella plástrið skiftast. Hetta fyri at bruni ikki skal koma í.


Landssjúkrahúsið

tel 304500, www.ls.fo

## Viðgerð

Tú kanst taka plástrið ella umvavið av eftir tveir dagar, um ikki annað er fyriskrivað.
Um sárið er í hárbotninum, kanst tú eftir tveir dagar vaska hárið varisliga og turka sárið við einum reinum handklæði.
Ansa eftir at sárið ikki verður dálkað meðan penturnar sita í.
Tann fyrsta dagin eftir at tú ert seymað/ur, kanst tú hava ilt. Halt sárið høgt og í frið. Tú kanst taka pínustillandi hondkeypsheilivág.

## Stívkrampavaccina

Í sambandi við at tú hevur fingið stívkrampa-vaccinu,(Tetanus) verður vaccinatiónskort útflýggjað. Á tí stendur hvussu leingi vaccinatiónin heldur. Eftir vaccinatiónina er vanligt, at vaccinatiónstaðið er eymt og reytt í nakrar dagar.

## Pentur

Penturnar skulu takast hjá kommunulæknanum eftir_____ dagar.



## Ver varin í sólini

Fyri at arrið ikki skal blíva ov sjónskt, so halt teg frá at lata ov nógva sól koma at arrinum teir fyrstu 3 til 6 mánaðirnar.
Set kanska eitt plástur á.

Landssjúkrahúsið

tel 304500, www.ls.fo